Búskapur og vinna:

## Tómur grunnur

Í Danmark er trygdargrunnurin hjá løntakarunum um at verða tómur. Orsøkin er, at útgjaldið úr grunninum hevur verið óvanliga stórt hetta seinasta árið, tí nógvar danskar fyritøkur hava verið illa fyri fíggjarliga. Hetta kostaði grunninum 289 milliónir krónur í fjør, og tað er nógv meiri enn onnur ár.

Grunnurin hevði roknað við, at útgjaldið fór at verða 200 milliónir krónur, men tað vísti seg, at fleiri fyritøkur enn væntað góvu skarvin yvir. Serliga nógvar danskar KT-fyritøkur góvust í fjør.

Tað eru arbeiðsgevararnir, sum gjalda í trygdargrunnin, og teir hava nú samtykt at hækka gjaldið næstan 100 prosent. Tað ber í sær, at í ár skulu arbeiðsgevararnir rinda 210 krónur fyri hvørt fólk, sum er í fullum starvi. Í fjør var gjaldið 110 krónur.

## Stórhandil í gjaldssteðg

Tað gongur framvegis tann skeiva vegin hjá amerikansku vinnuni, og í gjár boðaði stóra handilsketan K-mart frá, at hon var farin í gjaldssteðg. Hetta er tann størsti húsagangurin í amerikanska handilslívinum nakrantíð.

K-mart hevur 2114 handlar, og árligi umsetningurin hevur ligið um 15 milliardir dollarar. Leiðslan sigur, at fyritøkan hevur ikki annað í at velja enn at fara í gjaldssteðg, tí sølan er minkað munandi, samstundis sum skuldin er vaksin.

K-mart er meira enn hundrað ára gamalt, men leiðslan ætlar ikki, at handlarnir kortini skulu lata aftur. Roknað verður við, at bankin fer at halda virkseminum gangandi, og leiðslan hevur longu boðað frá einari "nýggjari byrjan" næsta ár.

UTTAN ÚR HEIMI

# Arafat er sum ein yvirgangsmaður



*Arafat sær út sum ein yvirgangsmaður og háttar sær sum eisini sum ein slíkur, svaraði Barak, tá hann á tíðindafundi varð spurdur um, hvat hann helt um Arafat*

*Mynd: Reuters*

**Tað sigur fyrrverandi ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Barak**

BARAK Í USA

*Árni Joensen*

Ehud Barak er í hesum døgum í USA, har hann hevur hitt fleiri embætismenn í stjórnarumsitingini í Washington.

Á einum tíðindafundi í gjár varð Barak spurdur, hvat hann heldur um palestinska leiðaran, Yasser Arafat, og lut hansara í ófriðinum. Barak svaraði, at Arafat sær út sum ein yvirgangsmaður og háttar sær sum eisini sum ein slíkur.

– Kanska er hann eisini yvirgangsmaður, segði Ehud Barak.

Fyrrverandi forsætisráðharrin helt, at tað er neyðugt og rætt at siga sannleikan um palestinska leiðaran, fyri at fólk kunnu gera sær eina mynd av manninum. Hvør myndin so verður, er upp til hvønn einstakan at gera av, segði hann.

Amerikanskir eygleiðarar vóru ikki sørt ovfarnir av orðalagnum hjá fyrrverandi ísraelska forsætisráðharranum. Teir vísa á, at Barak og Arafat komu næstan á mál við einari friðaravtalu á sumri í 2000, og orð Baraks vísa bert, hvussu breið gjógvin millum ísraelsmenn og palestinar er vorðin, siga eygleiðararnir í Washington.

# Amnesty International vil sleppa at avhoyra fangarnar á Kuba

**Amnesty International hevur biðið amerikansku myndugleikarnar um loyvi at sleppa at tosa við fangarnar í Guantanamo**

FANGARNIR Í GUANTANAMO

*Árni Joensen*

Tað er tann norska deildin hjá Amnesty International, sum hevur sent amerikansku myndugleikunum fyrispurningin.

Aðalskrivarin í AI í Noregi, Peter Eide, sigur, at felagsskapurin kennir seg ikki heilt tryggan, tí amerikansku myndugleikarnir eru ikki serliga fegnir um tær nógvu atfinningarnar, sum eru komnar seinastu dagarnar.

– Vit vita ikki, um tað, sum vit hava sæð á myndum, hevur til endamáls at leggja trýst á fangarnar, men vit vita, at myndugleikar aðrastaðni hava nýtt hesa somu ólógligu framferðina fyrr. Halda amerikanararnir ikki, at teir gera nakað skeivt, eiga teir at lata onnur sleppa at síggja viðurskiftini í fangaleguni, sigur Peter Eide.

Hann leggur afturat, at vilja amerikanararnir ikki ganga áheitanini frá Amnesty International á møti, ætlar felagsskapurin sær at biðja norsku stjórnina um hjálp.

Peter Eide sigur, at tað hevur stóran týdning fyri stríðið ímóti altjóða yvirganginum, at almenningurin fær at vita, hvussu fangarnir í hesum stríði verða viðfarnir.

Úr Norðurlondum:

## Heimahjálparar rýma

Felagið hjá donskum heimahjálparum ávarar nú kommunurnar um, at okkurt má gerast við arbeiðsumstøðurnar hjá limunum. Hendir einki, kann tað gerast trupult at fáa fólk at arbeiða sum heimahjálparar, sigur felagið.

Tað er serstakliga kappingin frá teimum privatu heimahjálparfyritøkunum, sum leggur trýst á ta kommunalu heimahjálpina. Fakfelagið sigur, at umstøðurnar hjá teimum, sum arbeiða hjá kommununum, eru so vánaligar og krevjandi, at nógvir heimahjálparar velja at gevast. Summar enda á sjúkrahúsi, og tað finnast fleiri dømi um, at heimahjálparar hava fingið varandi mein av arbeiðinum og eru vorðnar avlamispensjonistar, sigur fakfelagið.

Sambært felagnum eru arbeiðsumstøðurnar vorðnar soleiðis, at heimahjálpararnir hava alt ov lítla tíð at taka sær av teimum gomlu, tí kappingin krevur, at tær skulu skunda sær. Úrslitið er, at minni dentur verður lagdur á sjálvt arbeiðið, sigur fakfelagið hjá donsku heimahjálparunum.

## Umstríddur biskupur fer frá

Sigurd Osberg, sum hevur verið biskupur i Tunsberg í Noregi seinastu 12 árini, hevur óvæntað boðað frá, at hann leggur frá sær.

Sigurd Osberg vakti ans, tá hann sum tann fyrsti av norsku biskupunum hættaði sær at viðgera støðuna hjá samkyndum í norsku kirkjuni. Tað var í 92. Leingi var hann tann einasti, sum tók málið upp á tunguna, men seinni fekk hann stuðul frá nøkrum av sínum starvsfeløgum, teirra millum Oslo-biskupinum Gunnar Stålsett.

Tað eru Haraldur kongur og kirkjumálaráðharrin, sum í felag skulu tilnevna nýggjan biskup í Tunsberg, men fyrst verða fleiri innstillingar. Hildið verður, at ein kvinna, tann 45 ára gamla Helen Bjørnøy, hevur ein møguleika at taka við embætinum.

Bilar

Nr. 16 • hósdagur • 24. januar 2002 • 76. árg.



*Innan er tilfarið á instrumentborðinum og hurðabetrekkunum er bleytari, og lítið er brúkt av hørðum plastikki*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Toyota Corolla 2002 – alt er nýtt uttan navnið




*Eyðun Lisberg frá Reyni Service sýnir her fram nýggja Corolla hatchback við 5 hurðum*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Toyota Corolla, ið eru ein av heimsins mest seldu bilum, koma nú á marknaðin við eini heilt nýggjari røð av ymiskum modellum. Har eru hatchback, stationcar og Verso, tó er óvist nær sedan útgávan kemur hendan vegin**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*

Toyota hava stórar ætlanir við nýggja Corolla, og eftir teimum góðu ummælunum, teir fáa í útlendskum bilmagasinum, er onki at ivast í, at bilurin verður ein "succes". Nógv er gjørt burturúr at halda kvalitetin á bilinum á so høgum støði sum gjørligt. Hetta merkist serliga innan, har til dømis tilfarið í instrumentborðinum er bleytari, og lítið er brúkt av hørðum plastikki. Við tað at aksulfrástøðan er størri á øllum útgávunum, er meira beinpláss til tey ferðandi á baksetrunum.

### Elektriska servostýring

Eins og fleiri aðrir nýggir bilar hava allar útgávurnar elektriska servostýring. Allar útgávurnar hava eisini originalt radio við fløguspælara sum standard. Bilurin er sera lættur og ljóðleysur at koyra, eisini dieselmotorurin larmar lítið. Tríggir VVTi bensinmotorar eru at velja ímillum: 1,4 litur við 97 hk, 1,6 litur við110 hk og T-Sport við 192 hk. Dieselmotorurin er 2.0 við 90 hk.

### Framsýning hjá Reyni Service

Corolla koma sum hatchback við 3 og 5 hurðum, stationcar, ið er 20 cm longri og MPV bilurin Verso. Óvist er nær Corolla sedan, ið verða gjørdir í Turkalandi, verða her. Designið er smart og alt er gjørt fyri at tekkjast evropeisku keyparunum. Í sambandi við at nýggja Corolla røðin er komin til landið, verða teir sýndir fram hjá Reyni Service frá mikudegnum til fríggjadagin frá kl. 8-17 og leygardagin frá 10-15. Frá Reyni Service verður sagt, at øll eru vælkomin at síggja og royna bilarnar.

## Toyota Corolla Hatchback 5/h

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.6 litur VVTi 16V 110 hk |
| 0-100 km/t | 10.2 sek. |
| Bensinnýtsla | 14.3 km/l |
| Dekkstødd | 195/60-15 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 418 cm |
| Breidd | 171 cm |
| Hædd | 148 cm |
| Eginvekt | 1175 kg |
| Totalvekt | 1650 kg |
| prísur | kr. 177.600,- koyriklárur. |
| Søluumboð | P/F Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tlf. 313040<br>www.reyniservice.fo |




*Corolla stationvognurin er 20 cm longri enn hatchback útgávan*

*Mynd: Jens K. Vang*